# Nøvn

## Listafelag Føroya er 70:

# Fimm framfús listafólk

**Listafelag Føroya letur upp framsýning fríggjadagin tann 4. februar kl. 15 við Snarskivuna á Vaglinum í Havn**

Nevndin í Listafelag Føroya

Hetta er fyrsta av fimm framsýningin í ár, sum Listafelag Føroya skipar fyri. Talan eru um fimm einframsýningar, sum byrja í Havn og fara til Klaksvíkar og Tvøroyrar. Hetta verður gjørt í sambandi við, at tann 23. mars eru tað 70 ár síðani, at Listafelag Føroya varð stovnað. Til tess at gera vart við virksemið hjá felagnum hesi mongu ár og gera tað á ein hátt, sum er til frama fyri list og listaáhugað í landinum verða framsýningarnar um alt landið.

### Annika á Lofti

Tann, sum leggur fyri, er tann ágrýtna Annika á Lofti, sum í royndum sínum bjóðar listini av og setur spurnartekin við hvat list er og hvar list hoyrir heima. Hon hevur sýnt fram á listaframsýningum í Føroyum og uttanlands síðani 2003. Umframt nógvar Ólavsøkuframsýningar og Summarframsýning í Norðurlandahúsinum, hevur hon sýnt fram á Listasafn Reykjavíkur, í Ráðhúshøllini og á Ny Carlsberg Glyptotekinum í Keypmannahavn, á Leopold Museum í Wien og á Universität der Kunst í Berlin.

Annika á Lofti (f. 1983) hevur BA-prógv í list frá Listaháskúla Íslands, hon hevur lært til fotograf Tekniska skúlanum i Keypmannahavn og á Danmarks fotografiske billedkunsskole. Hon hevur eisini undirvíst ungum í list i Heinesenshúsi í Havn.

### Endurskin

Evnið í hesi framsýningini hjá Anniku á Lofti er reflektión – endurvarp, afturvarp, afturkast o.t.

Ljós, sum verður varpað aftur sum endurskin og skygging. Spegilsmynd bæði í beinleiðis og í fluttari merking sum mynd og hugsan. Hon hevur einans arbeitt við klárum tilfari og í tí sæst "einki". Men reflektiónin frá glasinum á bakgrundina er sterk og klár. Hon kennir seg



aftur í hesum á tann hátt, at hon sker so nógv burtur, sum hon fær soleiðis at eitt sindur er eftir. Tað minnir um tárini, hon gjørdi herfyri.

Listasavnið eigur trý hologramm frá 2007 og 2008 eftir hana. Tey bæði verkini eftir Anniku, sum Listafelagið eigur, eru í varðveitslu á Listasavninum. Tey eru enn eitt hologramm (2007) og Tár (2008).

### Framsýningarrøðin

Framsýningarnar í sambandi við 70árahaldið hjá Listafelagnum umfatar avtalur við fimm ung listafólk. Hvør teirra sýnir fram í tríggjar mánaðar: ein mánað við Snarskivuna hjá Havnar Kommunu, ein í bókahandlinum og gallarínum Leikalund í Klaksvík og at enda ein mánað í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Ungu og framfýsnu listafólkini eru:

**1** Annika á Lofti byrjar í Havn í februar, í Klaksvíkar í mars og á Tvøroyri í apríl.

**2** Heiðrikur á Heygum í Havn í apríl, í Klaksvíkar í mai og á Tvøroyri í juni.

**3** Marianna Mørkøre í Havn juni, í Klaksvíkar í juli og á Tvøroyri í august.

**4** Sámal Blak í Havn í oktober, í Klaksvíkar í november og á Tvøroyri í desember.

**5** Jón Sonni Jensen í Havn í desember, í Klaksvík í januar 2012 og á Tvøroyri í februar 2012.

Framsýningin Listafelagið 70-1 letur upp við Snarskivuna fríggjadagin 4. februar kl. 15.

# Móðir og dóttir sýna fram í Smiðjuni

Harriet Poulsen Vágadal og Alexandra (Alex) Palmquist Poulsen hava framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í døgunum 4. - 8. februar, hvønn dagin frá 14:00 - 19:00. Fernisering verður fríggjadagin 4. februar klokkan 14, har Alex fer at spæla violin. Framsýningin hevur heitið: »Á ferð«.

Harriet var á 3-ára listaskúla í Ísrael, á Tel Hai Academy, har hon serliga legði seg eftir at mála og tekna. Harriet hevur havt sjálvstøðugar framsýningar, verið við í felagsframsýningum, á Ólavsøkuframsýning, á Várframsýning og øðrum. Harriet starvast sum lærari, og er tað tí mest í ferium, at hon tekst við list. Um summarið verður av og á farið á skeið í list á háskúla. Á Ólavsøku fyri hálvum øðrum ári síðan læt Harriet upp sítt egna gallarí, »Gallarí/studio«.



Alex er næmingur í NámX. Hon er virkin og gongur til violin, klaver og japanskt. Alex hevur yrkingar, søgur, myndir og filmar á netinum og hevur sínar subscribers, ið geva henni feedback. Alex »cosplayar« saman við vinum, og hevur hon fyri stuttum verið á eini ráðstevnu fyri cosplayarar í Keypmannahavn.

Hetta er aðru ferð, at Harriet og Alex sýna fram saman. Fyrstu ferð var fyri sjey árum síðani, tá ið Alex var 8-ára gomul.


## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Peter Ove Eliasen**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðaður.

Hjartaliga takk tit, sum vóru um hann á Ríkissjúkrahúsinum og á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Eisini takka vit talarum, sangarum, spælarum, berarum, og tykkum øllum, sum hjálptu so væl til við ervinum. Eisini takka vit tykkum, sum komu inn á gólvið við køkum og øðrum. Hjartaliga takk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Takk Harri fyri ugga og troyst.

*Familjunnar vegna*
**Elsa Maria,**
**Louisa, Peter og Leif við familjum**